# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingur til G3

Á onkologiska ambulatoriinum er eitt avloysarastarv vegna barnsburð á starvsbrøki 0,8 leyst at søkja til setan 1. mai 2008 ella eftir avtalu til og við 31. januar 2009.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- kunna og vegleiða sjúklingar og avvarðandi um krabbamein
- tryggja eina kvalifiseraða viðgerð og eftirkanning av sjúklingum
- samskipa samstarv við aðrar deildir, primer øki og Ríkissjúkrahúsið
- kunna, vegleiða og undirvísa aðrar deildir um røkt og viðgerð av krabbameinssjúklingum
- samskipa viðgerð og eftirkanning hjá krabbameinssjúklingum
- sjálvstøðugar viðtalur
- ráðgeva um linnandi sjúkrarøkt
- geva kemoviðgerðir

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- kemoskeið
- faklig vitan innan økið
- kliniskar royndir innan røkt og viðgerð á økinum
- góð tvørfaklig samstarvsevni
- arbeiða sjálvstøðugt

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompotentar og virknar starsvfelagar
- tvørfakligt samstarv
- fakliga menning

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava:**
- onkologiska eftirútbúgving
- drúgvar kliniskar royndir innan viðgerð og røkt av onkologiskum sjúklingum

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Evu Mortensen, deildarleiðara á G3, lokal 6250, lsevmo@ls.fo ella til Mariu Debess, onk. amb., lokal 6210.

**Umsóknarfreistin er** 31. mars 2008 kl.12.00

## Sálarfrøðingur

Á Psykiatriska deplinum er eitt fulltíðarstarv leyst at søkja hjá kliniskum sálarfrøðingi til setan 1. apríl 2008 ella eftir nærri avtalu. Talan er um starv fyri sálarfrøðing í farloyvi í 1 ár.

Arbeiðsøkið hjá sálarfrøðinginum umfatar kanningar og viðgerð, samskipan, tílsýn á somatiskum deildum, ráðgeving, undirvísing og supervisión í einum størri tvørfakligum viðgerðartoymi. Á deplinum starvast 5 sálarfrøðingar.

**Vit leggja dent á, at**
- tú hevur góð samstarvsevni, ídni, hug og dirvi til at luttaka í einum sera fjøltáttaðum diagnostiskum og viðgerðarligum arbeiði saman við øðrum fakbólkum
- tú kanst arbeiða ábyrgdarfult og sjálvstøðugt
- tú hevur førleikar og royndir í at standa fyri kanningum og viðgerð av fólki við sálarligum trupulleikum

**Fyrimunur er, um**
- tú hevur sergrein í kliniskari psykologi við hóskandi eftirútbúgving/ arbeiðsroyndum, autorisatión og supervisiónsførleika
- tú skilir, tosar og skrivar føroyskt

Kandidatar uttan autorisatión og eftirútbúgving kunnu eisini søkja.

**Vit kunnu bjóða**
- nógvar spennandi og fjøltáttaðar arbeiðsuppgávur
- eitt spennandi og gott arbeiðsumhvørvi í menning
- tvørfakligt umhvørvi
- nógvar eldsálir, ið brenna fyri sakini
- góðar møguleikar fyri upplæring og luttøku á fakligum skeiðum

**Nærri upplýsingar um** starvið fáast við at venda sær til leiðandi yvirlækna á Psykiatriska deplinum Tormóður Stórá, telefon 304500, lokal 4100, teldupostur lstost@ls.fo ella til leiðandi sálarfrøðing Hera Kragesteen, lokal 4150, teldupostur: lsherkr@ls.fo

**Umsóknarfreistin er** 28. mars 2008

## Sjúkrarøktarfrøðingur til Útistovu

Eitt fast fulltíðarstarv sum sjúkrarøktarfrøðingur er leyst at søkja til setan frá 1. mai 2008.

Útistova er ein starvsstova við ymiskum sergreinum undir Skurðdeplinum, sum eru:

Gynækologi/Obstretik, Almen kirurgi, Ortopedkirurgi, Urologi, Plastiskkirurgi umframt Dagskurðdeild.

Aðrar funktiónir eru: forkanningar undan skurðviðgerðum, eftirviðgerðir, eftirlit, sárviðgerð, sárrøkt, smærri skurðviðgerðir, aðrar kanningar og ráðgeving.

Útistova stendur fyri nýggjum avbjóðingum í samband við, at flutt verður í nýggj hølir á 3. hædd í høvðusbygninginum í nærstu framtíð.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- faklig vitan innan økið
- kliniskar royndir innan kirurgiska sjúkrarøkt og viðgerð
- góð samstarvsevni
- kann arbeiða sjálvstøðugt

**Vilt tú vita** meira um starvið, kanst tú ringja 304500 til Birtu Weihe, deildarleiðara í Útistovu, lokal 5400 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, t-postur: lsnaitu@ls.fo

**Umsóknarfreistin er** 28. mars 2008 kl. 12.00

## Onnur størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Yvirlækni til Røntgendeildina**
Umsóknarfreistin er 17. mars 2008

**KT-starvsfólk**
Umsóknarfreistin er 17. mars 2008
kl. 12.00

**Starvsfólk til Fíggjardeildina**
Umsóknarfreistin er 17. mars 2008
kl. 12.00

**Ljósmøður**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008

**Ergoterapeutur**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008
kl. 12.00

**Starvsfólk til Húsavørðin**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008
kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari/pleygari til Psyk D1**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008
kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G3, onk. amb.**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008
kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G3 fyri deildarleiðara**
Umsóknarfreistin er 26. mars 2008
kl. 12.00

**Summarferiuavloysarar**
Umsóknarfreistin er 27. mars 2008

**Læknaskrivaranæmingar**
Umsóknarfreistin er 28. mars 2008
kl. 12.00

**Radiografar/Røntgensjúkrarøktarfrøðingar**
Umsóknarfreistin er 11. apríl 2008

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo